LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Tórshavn, 4. desember 2018
Mál nr. 0106-037/18

Uttanlandsnevndin, Annita-- á Fríðriksmørk, formaður
Rættarnevndin, Kristin Michelsen, formaður
Løgtingið
Tinghúsvegur 3
100 Tórshavn

**Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 71/2018 Yvirtøka av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki og løgtingsmáli nr. 77/2018 ríkislógartilmæli um lov om stedbestemt information**

Eftir at løgmaður legði fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um yvirtøku av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki, og efter at landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum legði fyri Løgtingið uppskot til ríkislógartilmæli um lov om stedbestemt infomation er komið fram, at tvístøða er millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvørt hesi tingmál skulu bíða eftir frágreiðingum í felagsnevndararbeiðum millum danskar- og føroyskar myndugleikar um yvirtøku av land- og sjókortsøkinum. Serliga hugsa danir um, at markamótið millum kort- og landmátingarmálsøkið og verjumálsøkið eigur at verða lýst neyvari áðrenn yvirtøkuna.

Greiða fatanin hjá Løgmansskrivstovuni var, at endamálið við felagsnevndararbeiðinum var at fyrireika praktisku yvirtøkuna og ikki grundarlag undir sjálvari yvirtøkuavgerðini, tí at málsøkið ikki kemur undir tey málsøki, sum nevnd eru í yvirtøkulógini § 2, stk. 2, jbr. lista I, sum tingast skal um áðrenn yvirtøku, men stk. 1, har tingingar áðrenn ikki er eitt lógarkrav. Løgmansskrivstovan metir, at markamótini eins væl kunnu loysast við avtalu eftir yvirtøkuna og í sambandi við, at uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om stedbestemt information (Myndugleikaflyting vegna yvirtøku av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki) seinni verður lagt fram. Hetta er eisini meginreglan, ið hevur verið fylgd, tá aðrar yvirtøkur hava verið framdar eftir § 2, stk. 1 í yvirtøkulógini.

Av skilhaldsgrundum kunni eg tykkum um hesa tvístøðu, sum er nærri lýst í hjálagda brævaskifti.

Vinaliga

Aksel V. Johannesen
løgmaður

/

Sjúrður Rasmussen
løgfrøðiligur ráðgevi

Avrit:
Heilsu- og innlendismálaráðið, Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo